Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 26.11.2020 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Jóhan Christiansen<br>Brandur Jacobsen<br>Árni Jacobsen<br>Hjalti Dalheim<br>Tollakur Joensen<br>Hans Mourits Foldbo<br>Gudny Langgaard<br>Uni Rasmussen<br>Hanna Jensen |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 90/20 | 20/00138-3 | mál 20/00138 - Sáttmáli millum SSL og Eysturkommunu um leið 410 (skúlabarnaflutning) | 3 |
| 91/20 | 20/00421-1 | 20/00421 - Søla av vinnustykki nr. 4 í Gøtudali | 4 |
| 92/20 | 20/00373-3 | 20/00373 - Umsókn um keyp av lendi afturat matr. nr. 297 UG og loyvi til at byggja uppí neystið | 5 |
| 93/20 | 20/00231-8 | 20/00231 - Fyrispurningur um øki til løðistøð í Gøtudali | 6 |
| 94/20 | 20/00391-3 | 20/00391 - Umsókn um byggiloyvi á matr. nr. 100c | 7 |
| 95/20 | 20/00023-4 | Mál nr. 20/00023 - Vegur eystanfyri ánna í Norðragøtu | 8 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 96/20 | 20/00185-6 | 20/00185 Fíggjarætlan 2021 | 11 |
| | | | |

**Mál til viðgerðar**

## 90/20 mál 20/00138 - Sáttmáli millum SSL og Eysturkommunu um leið 410 (skúlabarnaflutning)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 24.11.2020 | 75/20 | 20/00138-3 |
| 2 Býráðið | 26.11.2020 | 90/20 | 20/00138-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur havt sáttmála við SSl um leið 410, sum hevur tikið sær av skúlabarnaflutninginum fyri næmingarnar sum ganga í Fulgajarðar skúla.<br><br>Sáttmálin er farin út gildið og skal endurnýggjast. Fyriliggjandi sáttmáli inniheldur tað sama sum sáttmálin sum er farin út gildið. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Gjaldið veður áleið tað sama sum tað hevur verið, peningur er avsettur á fíggjarætlanini. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til góðkenna fyriliggjandi uppskot til sáttmála |

**Fíggjarnevnd 24. november 2020**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 26. november 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

## 91/20 20/00421 - Søla av vinnustykki nr. 4 í Gøtudali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 23.11.2020 | 45/20 | 20/00421-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.11.2020 | 78/20 | 20/00421-1 |
| 3 Býráðið | 26.11.2020 | 91/20 | 20/00421-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| 5 vinnustykkir vóru til sølu og av teimum eru 4 seld. Tað seinasta stykkið varð lýst til sølu tann 19 okt, 2020 og eru tað 3, sum hava svara at teir eru áhugaðir í at keypa stykkið. Víst verður til mál nr. 19/00541, 20/00013 og 20/00304.<br><br>Býráðið hevur tilskilar sær nakrar treytir við søluni s.s. slag av virksemi, fasada ímóti landsvegnum og hvussu virksemi hóskar til ætlanir og verandi virksemi. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at avgerð verður tikin í býráðnum um hvør av áhugaðu keyparunum, fær tilskilað stykkið. |

**Vinnunevndin 23. november 2020**
Vinnunvendin mælir til at umsitingin fær tekningar og frágreiðing av virksemi til støðutakan til komandi fund í vinnunevndini.

**Fíggjarnevnd 24. november 2020**
Málið tikið av skrá

**Býráðið 26. november 2020**
Málið tikið av skrá

## 92/20 20/00373 - Umsókn um keyp av lendi afturat matr. nr. 297 UG og loyvi til at byggja uppí neystið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.11.2020 | 46/20 | 20/00373-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.11.2020 | 79/20 | 20/00373-3 |
| 3 Býráðið | 26.11.2020 | 92/20 | 20/00373-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Ánari av matr. nr. 297 Undir Gøtueiði hevur sent umsókn um keyp av lendið.<br><br>Umsøkjarin skrivar at hann ynskir at økja um verandi matrikul, fyri at útbyggja neystið. (Sí skjøl í málinum).<br><br>Vísandi til mál nr. 20/00369, so hevur Eysturkommuna í øðrum málum ikki sagt ja til at selja lendi á havnarlagi í kommununi. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður frá at ganga umsóknini á møti. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. november 2020**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 24. november 2020**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 26. november 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 93/20 20/00231 - Fyrispurningur um øki til løðistøð í Gøtudali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.11.2020 | 45/20 | 20/00231-8 |
| 2 Býráðið | 26.11.2020 | 93/20 | 20/00231-8 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| SEV hevur sent umsókn loyvi at seta skjótløðistøð í Gøtudali. Sí skjøl í málinum.<br><br>SEV skrivar í umsóknini at ætlaðu løðistøðirnar eru orkukrevjandi, og bíligast er, at hesar verða staðsettar nær við verandi traffistøðir. Eisini er ynski um, at tær verða staðsettar tætt at høvusvegnum. Talan er um matr. nr. 193b í Norðragøtu. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at ganga umsóknini á møti. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. november 2020**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 26. november 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarksipanarnevndini.

## 94/20 20/00391 - Umsókn um byggiloyvi á matr. nr. 100c

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.11.2020 | 47/20 | 20/00391-3 |
| 2 Býráðið | 26.11.2020 | 94/20 | 20/00391-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Ánari av matr. nr, 100c hevur søkt um loyvið at byggja eina hædd omaná verandi bilhús. Sí umsókn í málinum.<br><br>Verandi bygningur er eitt bilhús, har ætlanin er at byggja omaná bilhúsið og gera um til sethús.<br><br>Verandi bilhús er bygt í mark, men 1.hædd kemur at verða 2,5m frá marki.<br><br>Um umsóknin skal gangast á møti, má frávik gevast í samband við hæddarviðurskiftinum. Í Øki B-Bústaðarøki er mest loyvda hædd til yvirgrind 5 m og 8,5 m til møn. Í fyriliggjandi umsókn er hæddin á húsinum 6,7 m til hægsta punkt. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at ganga umsóknini á møti. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. november 2020**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 26. november 2020**
Málið tikið av skrá.

## 95/20 Mál nr. 20/00023 - Vegur eystanfyri ánna í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 20.05.2020 | 17/20 | 20/00023-4 |
| 2 Fíggjarnevnd | 25.05.2020 | 35/20 | 20/00023-4 |
| 3 Býráðið | 04.06.2020 | 34/20 | 20/00023-4 |
| 4 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.11.2020 | 48/20 | 20/00023-4 |
| 5 Býráðið | 26.11.2020 | 95/20 | 20/00023-4 |
| 6 Fíggjarnevnd | 24.11.2020 | 77/20 | 20/00023-4 |

**Málslýsing:**

Umsitingin hevur móttikið uppskot frá Ósbjørn Jacobsen Arkitekti um hvussu vegurin framvið ánni í Norðragøtu kann skipast. Sí skjal, sum eitur "*Norðragøta ferðslutrygd og fríøki A3 Final*" í málinum.

**Ískoyti 20.11.2020**

Vit hava móttikið útbjóðingartilfarið. (Víst verður til skjøl í málinum).

Utbjóðingartilfarið er ein "yvirflatu" verkætlan, tað merkir at man bert hevur hugsa um vegin (asfalt v.m.) og ikki undirlendið.
Vit hava gjørt onkrar graviroyndir, tær vísa at vegurin er ein gamal eyrvegur, sum er sjúnkaður ymsastaðni.
Tað kann vera at undirlendi fer at fara meira, ella fer at uppføra seg øðrvísi, hvis man bara tekur asfalti av og koyrir omaná aftur.
Eldri vegir halda sum oftast fínt, til man fer at pilka ov nógv við.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

1.500.000 kr. er sett av í fíggjarætlanini 2020.
Enn kenna vit ikki samlaða kostnaðin fyri verkætlanina. Men vit hava fingið ein prís uppá ráðgeving (Sí skjal "*Við Ánna í Norðagøtu - 1. byggistig – Ráðgeving*").

**Ískoyti 20.11.2020**

Vit kenna ikki kostnaðin, fyrr enn verkætlanin er boðin út, men ein kostnaðarmeting fyriliggur.
546.910 kr. er eftir av játtanini fyri 2020.

**Tilmæli**

Mælt verður til at leggja verkætlanina fyri býráðið til støðutakan.

**Ískoyti 20.11.2020**

Mælt verður til at steinseta undir vegnum, hvis man hevur ætlan at fara í gongd við verkætlanina.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 20. maj 2020**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 25. maj 2020**
Meirlutin, Jóhan Christiansen og Gudny Langgaard mæla til at taka málið upp í samband við fíggjarætlanina fyri 2021. Minilutin Hjalti Dalheim mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 04. juni 2020**
Tollakur Joensen setti fram broytingar uppskot:

*Skoti verður upp at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til veg og at projektera vegin niðan til Rokoko, og gera klárt til útbjóðing*.

Fyrst var atkvøtt um broytingaruppskoti og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Hjalti Dalheim, Uni Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Hans Mourits Foldbo, Brandur Jacobsen

**Atkvøður ímóti:**
Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Árni Jacobsen.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. november 2020**
Tollakur Joensen og Uni Rasmussen mæla til at fyriliggjandi verkætlan frá krossvegnum og til Guðrunargøtu 1 (uml. 100 metur) verður boðin út. Samstundis verður mælt til, at írestandi upphædd verður sett av á fíggjarætlani 2021.
Árni Jacobsen tekur støðu á býráðsfundi.

**Fíggjarnevnd 24. november 2020**
Fíggjarnevndin mælir til at málið verður útsett til komandi býráð at taka støðu til.

**Býráðið 26. november 2020**
Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Hjalti Dalheim, Hanna Jensen, Gudny Langgaard, Árni Jacobsen, Hans Mourits Foldbo, Brandur Jacobsen,

**Atkvøddu ímóti:**
Tollakur Joensen, Uni Rasmussen

## 96/20 20/00185 Fíggjarætlan 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 22.09.2020 | 57/20 | 20/00185-6 |
| 2 Býráðið | 24.09.2020 | 72/20 | 20/00185-6 |
| 3 Vinnunevndin | 23.11.2020 | 46/20 | 20/00185-6 |
| 4 Fíggjarnevnd | 24.11.2020 | 76/20 | 20/00185-6 |
| 5 Býráðið | 26.11.2020 | 96/20 | 20/00185-6 |

**Málslýsing:**

Víst verður til fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri 2021

**Ískoyti 24.11.20**

Fíggjarnevndin hevur gjørt uppskot til 2 .viðgerð av fíggjaræltan fyri 2021. Høvuðstøluni heru hesi:

| | |
|---|---|
| **Inntøkur** | **119.471.000** |
| Rakstrarútreiðslur | 98.004.000 |
| Rentuútreiðlsur | 1.057.000 |
| Útreiðslur til rentustuðul | 1.300.000 |
| Íløgur | 62.075.000 |
| **RLÚ** | **-42.965.000** |
| **Avdráttir** | **7.771.000** |
| **Úrslit aftaná avdráttir** | **-50.736.000** |

Skattaprosentið verður óbroytt 21, og barnafrádrátturin verður eisini óbroyttur 8.000,00 kr.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Mælt verður til at málið verður beint í føstu nevndinar til víðari viðgerð

### Fíggjarnevnd 22. september 2020

Fíggjarnevndin mælir til at beina málið í føstu nevndin ar til víðari viðgerð

**Býráðið 24. september 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

**Vinnunevndin 23. november 2020**
Vinnunevndin hevur gjøgnumgingið §7 og íløgurnar í fíggjarætlanini. Vinnunevndin mælir til at hava ein arbeiðsfund at viðgera fíggjarætlanina, áðrenn býráðsfundin 27-11-2020.

**Fíggjarnevnd 24. november 2020**
Fíggjarnevndin hevur gjørt uppskot til 2. viðgerð, og mælir til at fyriliggjandi uppskot verður samtykt.

**Býráðið 26. november 2020**
Samtykt at taka undir við fyriliggjandi uppskoti frá fíggjarnevndini til fíggjarætlan 2021

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Hjalti Dalheim, Hanna Jensen, Gudny Langgaard, Árni Jacobsen, Hans Mourits Foldbo, Brandur Jacobsen, Uni Rasmussen

**Atkvøddi blankt:**
Tollakur Joensen

fundurin lokin

Jóhan Christiansen

Brandur Jacobsen

Árni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Tollakur Joensen

Hans Mourits Foldbo

Gudny Langgaard

Uni Rasmussen

Hanna Jensen